Ætla at byggja n‡tt virki í Vági fyri 55-60 milliónir

Virki› skal taka arbei›a makrel, sild og annan uppsjóvarfisk. Ætlanin er at virki› skal taka ímóti minst 40.000 tonsum um ári› og ta› skal vera li›ugt um eitt gott ár

FYRITAKSEMI
Áki Bertholdsen

Gongst sum ætla›, ver›ur skjótt eitt stórt fiskavirki afturat bygt í Vági.

Ta› er eitt føroyskt felag vi› føroyskum og enskum partaeigarum, sum nú ætlar at byggja eitt n‡tt virki í Vági

Talan er um eitt virki til uppsjóvarfisk

Máli› hevur veri› nevnt á b‡rá›sfundi í Vági, har í stigtakararnir hava bi›i› um øki› til at seta virki› á. Ta› eru Johan Dahl í felagnum Faromar og samstarvsfelagir hansara í bretska felagnum »Andrew Marr International Limited«, sum standa fyri ætlanini.

Ta› skilst, at talan er um eitt virki, sum skal kunna virka 500 tons um samdøguri›. Ætlanin er at kunna skera fiskin til flak, og at heilfrysta og møguliga at virka fiskin enn meiri til a›rar framlei›slur.

Vænta› ver›ur, at virki› fer at taka ímóti 40.000-50.000 tons av uppsjóvarfiski um ári›.

Alt er ikki endaliga fingi› upp á pláss enn, men nú skuldi bara smálutir veri› eftir.

Blívur virki› til veruleika, er ta› ætlanin at byggja ein bygning uppá einar 5.000 fermetrar ni›anfyri frystigoymsluna, sum nú er. Talan ver›ur um at gera eina frystigoymslu upp á einar 1.800 fermetrar og sí›ani skal sjálvt uppsjóvarvirki› ver›a gó›ar 3.000 fermetrar.

Talan ver›ur um eitt ógvuliga framkomi› virki›, har nógv av framlei›sluni gongur av sær sjálvum. Men sjálvandi ver›ur eisini brúk fyri fólki, hóast virki› ver›ur nógv automatisera›. Sum vit hava fingi› upplıst, ver›ur talan um arbei›spláss til eini 35-40 fólk. Arbeitt ver›ur í tveimum vaktum vi› 15-18 fólkum á hvørjari vakt.

Gongst sum ætla›, skal virki› ver›a klárt at taka ímóti fiski í januar mána›a í 2002.

Sostatt hevur hevur Faromarr og bretska felagi› rættiliga sett fótin fastan í Vági.

Blívur uppsjóvarvirki› til veruleika, fer hetta felagi› einsamalt at upp- og avskipa› eini 60.000 - 70.000 tons av fiski um bryggjukantin í Vági um ári›.

Og tilsamans koma eini 70, kanska 80, fólk at ver›a kn‡tt at fyritaksseminum har, vi› teimum, sum koma at arbei›a á virkinum, teimum, sum koma at arbei›a vi› landing og avskiping og teimum, sum ver›a kn‡tt at stóru frystigoymsluni, i› sama fyritøka longu hevur í Vági.

Krevur djúpari havn

Vágs B‡rá› er sinna› at lata stykki til ta› n‡ggja virki›.

Men ein avgjørd fortreyt fyri, at ta› kann blíva til naka›, er, at havnavi›urskiftini ver›a betri.

Talan er um rættiliga stór skip, sum skulu at bryggju í sambandi vi› virki› og ta› er ney›ugt at havnin er minst níggju metrar djúp.

Hesi krøvini l‡kur Vágs Havn ikki í løtuni.

Men Jógvan Krosslá, b‡rá›sforma›ur sigur, at b‡rá›i› arbei›ir av fullari kraft fyri at loysa hendan trupulleikan.

Gongst sum ætla›, ver›ur nú fari› undir at byggja eitt stórt virki til uppsjóvarfisk í Vági. Virki› skal byggjast ni›anfyri frystigoymsluna og ta› skal klára at frysta 500 tons um samdøguri›. Á virkinum fer at ver›a arbeitt í tveimum vaktum og ta› ver›ur brúk fyri 15-18 fólkum á hvørjari vakt

Jógvan Krosslá heldur fram á ovastu rók í Vági

Tríggir av flokkunum í Vágs B‡rá› hava skipa› samgongu, íme›an tann fjór›i flokkurin er einsamallur uttanfyri í andstø›u

KOMMUNUVALI‹
Áki Bertholdsen



Jógvan Krosslá fekk dygga álitisváttan frá vágbingum á kommunuvalinum t‡sdagin. Og nú er eisini greitt, at hann ver›ur borgarstjóri í Vági tey næstu f‡ra árin. Men hinvegin koma Ey›finn Mørk og Dánjal Bjarkhamar at b‡ta næstformanssessin ímillum sín

Ta› er nú greitt, at Jógvan Krosslá heldur fram sum borgarstjóri í Vági tey næstu f‡ra árini afturat.

Samrá›ingar vóru mánakvøldi› um at skipa n‡ggja samgongu í Vágs B‡rá›. Og tær hepna›ust so væl, tí tá i› partarnir fóru til húsar aftur, var n‡ggj samgonga skipa›.

Og tey gjørdu ikki mætari enn at samgongan, sum hevur veri› hetta valskei›i› ímillum tjó›veldisflokkin, javna›arflokkin og sambandsflokkin, heldur fram.

Somulei›is er semja um, at tjó›veldisma›urin, Jógvan Krosslá, sum hesufer› fekk meiri enn tvær fer›ir so nógvar atkvø›ur, sum nakar annar b‡rá›slimur, skal halda fram sum borgarstjóri.

Hinvegin fær Vágs B‡rá› tveir varaborgarstjórar ta› komandi valskei›i›. Tí semja er um, at tey bæ›i fyrstu árini skal javna›arflokkurin hava varaborgarstjóran og ta› ver›ur Ey›finn Mørk. Tey bæ›i seinnu árini skal Dánjal Bjarkhamar, sum var› valdur á tjó›veldislistanum, ver›a varaborgarstjóri. Hann er varaborgarstjóri í hesum valskei›num.

Í fíggjarnevndini er borgarstjórin føddur forma›ur. Men umframt hann koma Páll Augustinussen úr javna›arflokkinum og Ásger› Stenberg úr sambandsflokkinum at manna fíggjarnevndina.

Í teknisku nevnd heldur Dánjal Bjarkhamar úr tjó›veldisflokkinum fram sum forma›ur. Hinir bá›ir limirnir eru Mortan Mortensen úr tjó›veldsiflokkinum og Ey›finn Mørk úr javna›arflokkinum.

Í Havnanevndini ver›ur Páll Augustinussen forma›ur tvey tey fyrru árini av valskei›num og tey bæ›i seinnu árini ver›ur Ey›finn Mørk forma›ur. Íme›an annar av hesum bá›um er forma›ur, er hin nevndarlimur. Tri›i limurin í havnanevndini ver›ur Mortan Mortensen.

Í mentanarnevndini er Ásger› Stenberg forma›ur og afturat sær hevur hon Turi› Kjærbo úr tjó›veldisflokkinum og Mortan Mortensen.

Samgongan, sum nú er skipa›, hevur ein stóran meiriluta aftanfyri seg vi› sjey av teimum níggju b‡rá›slimunum í Vági. Tjó›veldisflokkurin hevur f‡ra b‡rá›slimir, javna›arflokkurin tveir og sambandsflokkurin ein b‡rá›slim.

Einasti flokkur, sum sostatt situr í andstø›u, er uttanflokkalistin vi› tveimum b‡rá›slimum. Og hann fær heldur ongi umbo› í tær nevndir, sum bara hava tríggjar limir

Skuldin høvu›strupulleikin

Jógvan Krosslá sigur, at eisini hetta komandi valskei›i›, ver›ur høvu›smáli› at fáa kommununua fíggjarliga uppundan.

Vágs Kommuna hevur veri› sera hart rakt av kreppuni og í løtuni er skuldin hjá kommununi gó›ar 70 milliónir, sum eru umlei› 2,5 álíkningar.

Men kommunan er vi› í lániavtaluni hjá landsbankanum og eftir henni skal kommunan betala 10% av skuldini í avdráttum um ári› tey næstu fimm árini. Tvs, at næsta ár skal kommunan betala einar 11 milliónir í rentum og avdráttum.

Men sostatt minkar skuldin skjótt og tá i› fimm ár eru farin, ver›ur skuldin ikki meiri enn gó›ar 40 milliónir og ta› er ikki meir enn ein gó› álíkning.

Borgarstjórin sigur, at eitt anna› mál, sum kommunan arbei›ir av lívsins kreftum fyri at loysa, er, at byggja havnina út, so at hon l‡kur treytirnar hjá vinnulívinum.

– Eitt nú eru ætlanir um at seta stór virki á stovn í Vági, men tey krevja eina havn, sum er minst níggju metrar djúp og ta› royna vit av øllum alvi at finna útvegir fyri, sigur Jógvan Krosslá.

Hann sigur, at ta› er lívsney›ugt vi› fleiri virkjum vi› stø›ugum arbei›i í Vági, tí mi›al inntøkan hjá teimum vágbingum, sum arbei›a, er neyvan meiri enn einar hundra› túsund krónur um ári›. Og ta› er minst ein tri›ing lægri enn flest alla a›rasta›ni av teimum stóru plássunum í Føroyum.

Hann sigur, at ein stór orsøk til hetta, er, at arbei›i› er alt ov óstø›ugt í Vági, so at ta› mesta fólki› hevur ikki meiri enn einar 70-80.000 krónur í ársinntøku.

Svenskur professari í barnasálarsjúkufrø›i: Føroyingar eru tíggju ár aftanfyri grannalondini

– Ta› er umrá›andi, at hugbur›urin vi›víkjandi sálarsjúkum børnum broytist. Teirra trupulleikar eru biologiskt treyta›ir eins og hjá einum, i› hoyrir illa ella hevur ovurvi›kvæmi, sigur 50 ára gamli Christopher Gillberg, sum er professari í barnasálarsjúkufrø›i í Gøteborg í Svøríki. Hann er í hesum døgum í Føroyum og hevur undirvísing og fyrilestrar

SÁLARSJÚKUR
Stefan í Skorini

– Stø›an í Føroyum hjá sálarsjúkum børnum líkist henni í Svøríki fyri tíggju árum sí›ani. Man var varugur vi›, at sálarsjúkur vóru til sta›ar, men eingin tosa›i naka› serligt um tær, sigur Gillberg professari.

Sí›ani ta› er ein stór broyting farin fram í Svøríki. Gillberg metir, at í dag hava allir sviar hoyrt um t.d. autismu, damp ella a›rar sálarsjúkur, og fleiri gó›taka eisini sálarsjúkur nú enn fyri nøkrum árum sí›ani.

Her í Føroyum hava vit enn langan veg á mál. Vit eru ikki nóg opin hesum vi›víkjandi, men ta› ber til at sleppa undan at gera tey somu mistøkini, sum gjørd eru í Svøríki og Danmark, um vit læra av grannum okkara.

– Í Føroyum kenna familjur seg ofta bangnar, tá ta› ver›ur sta›fest, at eitt barn hevur sálarsjúku, men jú fleiri sannroyndir koma fram, tess lættari ver›ur ta› hjá familjum at gó›taka og liva vi› stø›uni.

4-5% eru sálarsjúk

– Um vit leggja sálarsjúkur sum autismu, damp, mentalt seinment og tourette saman, so eru eini 4-5% av øllum børnum illa rakt av onkrum av hesum sálarsjúkum, sigur Gillberg.

Hetta er ein stórur partur av fólkinum, tí ta› er tjúgunda hvørt barn, sum er sálarsjúkt. Her er bara talan um tey, sum eru veruliga sjúk, og ikki tey, i› bara hava ein feril av sjúkuni.

Ta› ber ikki til at siga, um tølini eisini eru galdandi fyri Føroyar, tí vit hava ikki nøkur eftirfarandi hagtøl, men ta› er einki, sum bendir á, at tali› er lægri í Føroyum enn a›rasta›ni. Tí kann roknast vi›, at vit lutfalsliga hava eins nógv sálarsjúk børn og grannalondini.

Tørvur er avgjørt á hagtølum fyri, hvussu nógv børn í Føroyum eru sálarliga sjúk, og ta› hev›i økt nógv um vitanina av sálarsjúkum í Føroyum.

– Ta› er umrá›andi at skilja, at ta› eru so miki› nógv, sum hava álvarsamar sjúkur. Slík børn hava tørv á stórari hjálp, men fáa ikki altí› ta ney›ugu hjálpina. Man hevur fyrr rokna› vi›, at tali› av sálarsjúkum børnum er nógv minni, enn ta› í veruleikanum er, og tí er hjálpin ikki nóg gó› á fleiri økjum.

– Fyri at kunna hjálpa hesum børnum krevst serkunnleiki á fleiri økjum. Medisinskur, sálarligur og pedagogiskur serkunnleiki skulu til fyri at børn kunnu fáa hjálp, sum munar naka›.

– Ofta er ta› so, at serkunnleikin vantar á einum øki, men ta› er ógvuliga umrá›andi, at man hevur eitt li› av fólki vi› serkunnleika, sum arbei›ir saman.

Foreldur skulu taka stig til kanning

Ta› eru dømi um, at foreldur í Føroyum hava bí›a› í fleiri ár, frá tí at tey hava fingi› illgruna um, at teirra barn hevur onkra álvarsama sálarsjúku, til læknar hava sett eina diagnosu fyri barni›. Henda bí›ití›in, har foreldur ganga vi› einum illgruna, kann vera ótolandi, men Gillberg mælir til, at foreldur sjálv taka stig til at krevja eina kanning av barninum.

– Ta› er av størsta t‡dningi, at foreldur fáa at vita, at slíkt finst allasta›ni, og at ta› kann raka teirra barn eins væl og onkran annan. Foreldur skulu sjálv taka stigi› at fáa barni› kanna›, so skjótt tey gerast bangin. Foreldur mugu sjálv vera vi› til at seta krøv.

– Sí›an eg kom higar, havi eg hoyrt um børn, sum hava fingi› sína diagnosu heilt seint í lívinum, har ynskiligt hev›i veri›, um ta› hendi fyrr. Jú fyrr barni› fær hjálp fyri sína sálarsjúku, tess betri fær barni› ta› seinni. Ta› fær baksláttur at bí›a vi› eini diagnosu.

Christopher Gillberg, professari í barnasálarsjúkufrø›i í Gøteborg, heldur, at vit í Føroyum eru eini tíggju ár aftanfyri sviar á hesum økinum. Men ta› n‡tist ikki at taka okkum tíggju ár at koma upp á sama stø›i

Mynd: Jens Kr. Vang

Foreldur skulu útbúgvast

– Foreldur skulu eisini hava útbúgving og lærdóm um sálarsjúkur, tá teirra barn fær sta›fest eina sálarsjúku. Foreldur hava tørv á kunnleika um sjúkuna og svør uppá spurningar um, hvussu arbeitt ver›ur vi› sjúkuni, hvussu kann barni› lærast.

Í Føroyum hava vit feløg fyri foreldur vi› børnum, sum hava ymsar sjúkur. Gillberg metir at hesi feløg hava sera stóran t‡dning fyri foreldrini, tí her kunnu tey tosa saman um felags trupulleikar vi› børnunum á ein annan hátt, enn tá tey tosa vi› læknan.

– Mítt ynski er, at meiningsleysa kjaki› ste›gar, og at vit fáa nøkur fakta á bor›i›. Eg vænti, at tosa› ver›ur meira evni› í framtí›ini í Føroyum, og ta› er umrá›andi, at øll gera sær greitt, at ta› kann raka ein og hvønn.

– Tá eg var ungur, tosa›i eingin um t.d. alzheimers, og ta› mátti dyljast sum mansmor›, um onkur hev›i ta› í familjuni. Nú er vanligt at tosa› ver›ur um ta›, og trupulleikarnir kunnu loysast ísta›in fyri at dyljast.

Christopher Gillberg sigur, at hansara meiningar eru grunda›ar á vísindaligar kanningar, og hann leggur teim ábyrgdarhavandi í Føroyum eina vi›, at allar avger›ir ver›a tiknar út frá einum vísindaligum grundarlagi. Solei›is fæst ta› besta úrsliti›.

Hann sigur at enda, at í einum so lítlum samfelag sum okkara, er umrá›andi, at man hevur ein mi›depil, har serkunnleikin er savna›ur. Men hann leggur afturat, at uppgávub‡ti› má vera so greitt sum til ber.